# Ítróttarfelag Fuglafjarðar




## ÍF - B36

LANDSKAPPING
Leygardagin 16. august 2003
Kl. 15.00 í Fuglafirði

HAVSBRÚN

Ítróttarfelag Fuglafjarðar
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fax 444 636

# ÍF - B36

**11. umfar í landskappingini hjá 2. deild monnum**
**16. august 2003**

## Leikskrá 6

**Útgevari:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd:**
*Gunnvá Dam*
*Birgar Larsen*
*Janus Petersen*
*Steinbjørn í Lambanum*
*Rógvi Róin*

**Myndir:**
*Rógvi Róin*

**Kápumynd:**
*Annar av gøtumonnunum á liðnum, Jan Skoradal, í skotvenjing hóskvøldið. Jan hevur veruliga bitið seg fastan á liðið, og er ein av trimum leikarum, sum hava leikt allar 900 minuttirnar í ár.*
*Mynd: Rógvi Róin*

**Prent:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting:**
*Rógvi Róin*



# ? VIT REISA OKKUM AFTUR!

Leygardagin hendi so tað, sum ikki er hent besta liðnum hjá okkum áður í landskappingini í ár. Teir taptu! Enntá ímóti botnliðnum av Toftum, sum við einum góðum innsatsi vann 1-0 á Svangaskarði.

Eitt tap hevur kanska ligið í luftini, tí seinastu fýra dystirnar hevur spælið ikki verið serliga sannførandi. Men kortini hava vit megna at fingið stig hvørjaferð, og tí liggja vit eisini í toppinum. Eitt topplið hevur eydnuna við sær, soleiðis er tað bara!

Vit kunnu bert verða samd um, at ímóti B68 á Toftum gekk einki serligt. -Lítið og einki skil var á spælinum, samstundis sum innsatsurin á vøllinum ikki var serliga góður. Onkur hendinga leikari kann verða nøgdur við sín innsats, um tað kann brúkast til nakað; helst ikki, tí tað er liðið, sum fær stigini.

Tapið hjá okkum hevði við sær, at kappingin um besta plássið í deildini og harvið sess í 1. deild komandi ár harðnaði. Sumbingar, sum eru okkara harðasti kappingarneyti í løtuni, vinna sínar dystir, og munurin áðrenn dystin í dag er bert tvey stig. Vit hava 23 og teir 21 stig.

Vit á leikskránni eru optimistiskir hóast mótgang seinastu umførini, og halda, at tapið leygardagin á Svangaskarði var *tað*. -Vit reisa okkum aftur, og tað við manér. -Leikararnir fingu ein veruligan hvøkk, sum fer at hava við sær, at teir vakna úr dvalanum, og dysturin í dag, verður fyrsta prógvið. –Venjarin hevur eisini fingið nakað at hugsa um, og ger helst tí nakrar broytingar á liðnum til dystin í dag. Onkur vil halda, at hesar treingja til! Ja, tað er kanska rætt, men hinvegin – og sum ein kendur fótbóltsvenjari eisini hevur sagt – hví broyta eitt vinnandi lið! Sigfríður hevur mest sum alt ár leikt við somu leikarum á somu plássum, og tað hevur riggað, og enntá væl flestu dystirnar. Hann hevur givið nøkrum ungum og evnaríkum leikarum kjansin og víst teimum ábyrgd. Og teir hava tikið av. Men tað kann verða, at trýstið nú gerst kanska nakað stórt, og tí halda vit, at tað er gott, at broytingar verða gjørdar á liðnum, og ábyrgd flutt á fleiri herðar.

Tí eru leikararnir í dag serliga uppsettir, og fara at gera ein innsats sum ongantíð áður. Hann er alneyðugur, nú kappingin harðnar, og hvør dystur gerst avgerðandi. Tí hava víst tað nærum alt ár. Latið dystin á Svangaskarði verða eindømi, og farið á vøllin við rætta hugburðinum og drívið á "teir síðstu 90 minuttirnar", sum ein ávísur fuglfirðingur segði.

Góðan dyst!





# TEIR SVØRT/HVÍTU ÚR HAVN VITJA Í DAG



*Avslappandi venjing hóskvøldið. Unglingaleikararnir hava havt eina strævna viku, samstundis sum onkrir leikarar hava smáskaðar at dragast við. Her eru f.v. Fritleif, Martin, Hanus, John, Áki og Sverri.*

Í dag vitjar so næstbesta liðið hjá árstalsfelagnum í Havn, B36. Kappingarárið hjá teimum hevur higartil verið so sum so. Teir hava vunnið tríggjar dystir, tríggjar javnleikir og tapt fýra dystir í kappingini, og hava sostatt 12 stig og liggja á einum 7. plássið. Um hetta er nøktandi er ilt at siga, men teir hava ligið við einum ávísum likamsluti í vatnskorpuni til fyri stuttum.

Hagtølini hjá teimum í Fuglafirði eru - tíverri fyri okkum – góð. Seinnu árini hava teir nevniliga vunnið flestu dystirnar her. Men tá skal somuleiðis sigast, at vit ikki hava verið serliga sannførandi í kappingini, og hava sum oftast ligið rættuliga javnir við B36. Hvussu verður í dag, er ilt at spáa um, men vit eiga og skulu vinna dystin, um vit framhaldandi skulu halda hinum liðunum – serliga Sumba – frá 1. plássinum.

**Nógvir skaðar**

Higartil í ár hava vit verið rættuliga hepnir, hvat viðvíkur skaðum og leikbannum. Einastu leikararnir, sum hava verið leikbannaðir higartil eru John, sum hevði fingið trý gul, og Fróði, sum fekk reytt í dystinum á varmakeldu ímóti LÍF. Men nú er støðan verri, serliga hvat viðvíkur skaðum. Fritleif fekk skaða í unglingadystinum ímóti B68 í síðstu viku, meðan Ken og Rógvi fingu skaða á Svangaskarði leygardagin. Fritleif hevur koygt fótin, men hevur kortini verið og vant hesa vikuna. Sigfríður hevur tó valt ikki at hava hann við í dag, tí hann metir, at tað er betur, at hann bindur frið í eina til tvær vikur. Ken fekk eitt ordans "trælær" tíðliga í dystinum ímóti B68, meðan Rógvi meiddi sær liðbondini í fótinum tíðliga í seinna hálvleiki. Hvussu leingi teir eru burtur er óvíst, men hvørgin teirra hevur vant hesa vikuna og verða tí ikki við í dag. At slíkir skaðar koma nú, er óheppið, tí tað er nú, vit hava brúk fyri øllum kreftum. Dystirnir gerast tættari, og tað er nú veruligu avgerðirnar fella. Tí vóna vit, at teir tríggir verða klárir aftur sum skjótast, og ikki fleiri leikarar fáa skaða.

**B36 – eitt gott lið**

Liðið, sum vitjar okkum í dag, er eitt gott lið, sum er samansett av nøkrum leikarum úr 1. liðshópinum og síðan nøkrum ungum og evnaríkum leikarum, sum kanska ikki enn hava fingið møguleikan á besta liðnum. Eisini er onkur eldri og meiri garvaður leikari á liðnum, nevnast kann Dánjal Petur Johansen, sum fyri fáum árum síðani var ein av føstu leikarunum á besta liðnum. Úrslitini seinastu dystirnar prógva eisini, at liðið er gott og hevur viðgang. –Teir hava vunnið sannførandi ávíkavist 4-0 og 3-1 ímóti B68 og B71.

*(framhald á bls. 26)*

BORGARSTJÓRIN SKRIVAR:

# ENDILIGA NÝTT GRAS LAGT Á VØLLIN!



"Leingi er til væl skal verða", sigur orðatakið, og "Betur seint enn ongantíð". Hesi orðafelli komu mær til hugs, nú eg skuldi skriva nøkur fá orð í sambandi við skiftan av graslíkisteppinum á vøllinum í Fuglafirði.

Sum flestum kunnugt fingu vit graslíki á vøllin í 1987, og eru tað sostatt 16 ár síðani. Tað er ongin loyna, at nú var teppið so nógv slitið, at tað bar ikki til at bíða longur. Annars hevur tað verið upp á tal tey síðstu 3 árini at skifta teppið, men hvørjaferð eru onnur mál raðfest fremri, t.d. sambýli, skúlin, útstykking, havnaútbygging, Mentanarhúsið, friðkan av býnum o.s.fr. Tað kostar 2. mill. krónur at skifta graslíkið, og peningurin fer jú úr kommunukassanum.

Vøllurin er nú klárur at taka í nýtslu, og sær alt sera gott út, og vónandi roynist hetta graslíkið líka væl sum tað undanfarna. Tosaði við onkrar, sum vandu á vøllinum nú eitt kvøldið eg kom framvið. Teir søgdu allir í einum, at vøllurin er "orduliga lekkur at spæla á".

So nú vænta vit, at úrslitið í dag, nú fyrsti dysturin í landskappingini í 2. deild á nýggja graslíkinum skal leikast, **verður líka lekkurt fyri okkum.**

Til kunningar er at siga, at farið varð undir at gera leikvøll í Fløtugerði í 1940. Í 1956 varð vøllurin liðugur og alment tikin í nýtslu. Vøllurin var altíð í minni lagi, men í 1979 vaks kommunan vøllin, so hann nú hevur tey góðtiknu mátini. Í 1987 varð graslíki lagt á, og nú í 2003 er tað skift út, og nýtt lagt á.

Alt hetta hevur havt ein ómetaligan týdning fyri bygdina sum heild. Ikki bara fyri ÍF, sum vøllurin fyrst og fremst er ætlaður, men eisini fyri onnur, tí vøllurin liggur so høgliga og væl fyri miðskeiðis í bygdini, tætt við skúlan og nú eisini dagstovnin og frítíðarskúlan, og kann sostatt eisini nýtast av hesum stovnum. Eisini sum alment spælipláss hevur vøllurin stóran týdning. –Børnini síggjast spæla á vøllinum frá morgun til kvølds.

Eg vil at enda ynskja borgarunum tillukku og góða eydnu við nýggja graslíkisvøllinum.

Sigurð S. Simonsen
Borgarstjóri



## TÚ



**Navn:** Árni Jóhan Petersen
**Føðingardagur:** 22.12.1981
**Føðistað:** Fuglafjørður (niðri í Frankaríki)
**Starv:** provianthandlari/krambakallur
**Pláss á vøllinum:** høgri bakkur, men....
**Hædd og vekt:** 185 cm. og 80 kg.
**Yvirtrúgv:** hyggi um Jan knýtur lissurnar **á** vøllinum
**3 orð sum lýsa teg:** Trúðfastur, tvørur og smekkur
**Torførast mótstøðumaður:** Che-guevara úr Cuba
**Frítíðarítriv:** Fótbóltur, fótbóltur og FIFA 2003
**Vónir fyri 2003:** at flyta upp í 1. deild, so vit kunnu hava eitt ordans ball, tá kappingin er av

## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** eg spældi tveir tá Piotr var í ÍF, men annars 4. august ímóti Sumba
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** í piltum
**Aðrar ítróttargreinar:** flogbóltur og lummatennis
**Minnigarríkasti dystur:** tá vit vunnu Cadbury-steypið í smádreingjadeildini. Eyðun skoraði frá miðjuni (eg legði upp:)
**Størstu fótbólstliga ávirkan:** pápi (ytri høgri)
**Besti fótbóltsleikari:** Zinedine Zidane
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** flogbólt
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** dystarvenjing
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** at renna langar teinar
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** ÍF-liðið, men annars: Buffon - Hyppia, Carlos, Ferdinand, Desailly - Beckham, Scholes, Zidane, Ronaldinho - Vieri, Del Piero

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** Ræstan fisk og Kondi (1/2 ltr.)
**Slag av tónleiki:** alt uttan harðan rokk og techno
**Sjónvarpssending:** Beverly Hills 90210
**At slappa av:** saman við Barbaru, damuni
**Troyggja nr.:** Nr. 12 (stolið hana frá mær, red.)
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Platini
**Sjónvarp/filmstjørna:** Edvard Norton
**Besta bók/blað:** Kabál gátan





VERO MODA

>> vælkomin í KATO

Fuglafjørður





Fysioterapiviðgerðarstova

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur

## Lastvognskoyring





**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

## Kári Zachariassen

**530 Fuglafjørður**

**tel. 444 245 ella 217 245**

## Føroya Shell

| | |
|---|---|
| Streymoy | 34 74 00 |
| Norðoyar | 45 77 11 |
| Eysturoy | 44 87 11 |
| Vágar | 33 27 11 |
| Sandoy | 36 17 11 |
| Suðuroy N | 37 27 11 |
| Suðuroy S | 37 47 11 |







**HYDRAULIK**
**RÁÐGEVING**
**VERKÆTLANIR**
**ÍSETANIR**
**UMVÆLINGAR**
**MASKINUMVÆLINGAR**
SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING



## Sølu-og tænastuumboð fyri:

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispøl)
- Rapp Hydema Syd (garna- og línuspøl, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspøl)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- Dension hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælimotorar)
- Dinamic Oil (kranaspøl)
- Finn Filter (hydraulik-, brennioljo og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (iðnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

## Á goymslu:

**Hydr, slangur og fittings, hydr, rør og fittings, (manøvri- og kúluventilar, kúlu-leigir, hydr. filtur, smyrji- og brenniolju-filtur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.**

## KJ-HYDRAULIK

P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com


Salong Yndi
530 Fuglafjørður
Tel. 444 490


Altíð til
dystin fús
FØROYA BANKI


HOTEL
Bílegging av pizza
www.pizza.fo


Ferðaseðlar
www.fonnflog.fo
kring allan knøttin
FONN FLOG
FO-700 Klaksvík - Tel. 456363 - Fax 457373 - fonnflog@fonnflog.fo




www.kondi.dk
FAXE
KONDI
MED DRUESUKKER







# SV - TRANSPORT

**Allur flutningur við:**

Lastbilum | Kranabilum | Trailarum

Dumparum | Bingjubilum

**530 Fuglafjørður** **tel. 44 41 77**





**Tilfar til umvælingar, ábøtur ella annað....**
**....spyr fyrst hjá okkum!!**

**Fuglafjarðar Timburhandil**
**tel. 444 126**






Fiskamjøl



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, høsnarungar, svín og neyt.

Fiskalýsi



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

Fiskafóður



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

Uppisjóvarfiskur



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.

HAVSBRÚN

**HAVSBRÚN**

Havsbrún Ltd. · 530 Fuglafjørður
tel. 444 100 · fax 444 160
havsbrun@havsbrun.fo
www.havsbrun.fo



## Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri eini tekning, vilja tit smiðja sjálvi ella skulu tey vera lyklaklár.

Eg bjóði meg til:

- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
v. Jørmund L. Juul (verkfrøðingur & húsasmiður)

☎ 21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jljuul@post.olivant.fo



CLIMACOOL
RESPW
**800⁰⁰**



REKORD
**700⁰⁰**



A CUB.TWIN
STRI
**1.400⁰⁰**



SUPERSTAR II
**700⁰⁰**

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR á Glyvrum · Glyvravegur · Glyvrar · tel 44 73 99 · fax 44 73 97





# Fuglafjørður



býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak



býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala



**Stutt sagt:**



býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**fuglafjarðar kommuna**
tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo

**Fuglafjarðar Keypsamtøka**

Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895

**Alfa Seafood Sp/f**

Box 10 · FO-530 Fuglafjørður · Tel. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 · E-mail: alfa@post.olivant.fo



Gardintoy
Gardinstengur
Persiennur
Rullugardinur
Liftgardinur
Tógv & stokkar
Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt
gardin ella tógv prát

**Profa Farvur**

v/Petur Gaardlykke · 600 Saltangará · tel. 44 91 49

**FAROE SEAFOOD**

Fiskavirkið í Fuglafirði · Postboks 53 · tel. 444 500 · faks 444 580

# Ítróttarfelag Fuglafjarðar takkar øllum lýsarum fyri dyggan stuðul.

Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Postboks 94 - 530 Fuglafjørður - tel./fax 444 636




Lamineraðir frontrútar til øll bilmerkir



# FLÜGGER

- Dygdarmáling til lágan prís
- Lyklar, innramming, gólvtilfar og fiskireiðskap til smábátin

*Tasjan á Bugnum*
530 Fuglafjørður
tel. 44 50 44
fartel.: 22 11 09



# BAADER®

Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu.

Nú umboða vit eisini Fomaco saltsproytur.

## P/F Petur Larsen




Föroya Bjór
PILSNAR


Reiðari innan frakt-
& sandbátar
Krana- og
lastvognskoyring
Sandsøla
SANDGREVSTUR
Stovnað 1949
530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921


Vit hava
útgerðina
til trol-, nóta-
og alivinnuna
VÓNIN
www.vonin.com


Hegn
15 ára royndir við tí grøna hegninum!
TEL
31 14 00
Landsins størsti veitari
P/F THOMAS DAM
Á HALSI • HEYKAVEGUR 1


B
S
P/F BOÐASTEINUR
Bakkavegur 26
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
Tlf. +298 444800
Fax +298 444840
E-mail: alibo@post.olivant.fo


HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA
HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA
UNDIRVATNSLJÓS
UNDIRVATNSKAMERA
TRÁÐLEYST VIDEO SAMSKIFTI
ALARMSKIPANIR
PLC-STÝRINGAR
EL-MOTORAR
EL-LUTIR
FREKVENS UMFORMARAR
EL-TALVUR
FYLGISVEINASJÓNVARP TIL SKIP
JT electric
JT electric Ltd. Kambsdalur Faroe Islands Tel +298 474444 Fax +298 474445 jtelectric.com

*Blómuhandilin*

**Orkis**

*625 Glyvrar*

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

*Stórt úrval av gávulutum*

*tel 44 82 89*
*fax 44 89 89*

**Danny Transport**

**Tel. 31 91 92**

**Flutningur um allan heim!**




**Landsins størsta og besta úrval av ítróttarheiðursgávum**

- Steyp
- Heiðursmerki
- Heiðursbrøv
- Toy við búmerki
- Streamers
- Klistrimerki
- Seruppgávur við gravering

**Vit seta títt búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað**

FA. **EILIF ARGE**
KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK
TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76



**Tannlæknastovan**

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358



**Nissan Micra**

Tann nýggi Nissan Micra er ætlaður at skapa gleði millum fólk.

Tann nýggi Nissan Micra hevur til dømis minsta vendiradius í sínum flokki. Nýggi Micra hevur eisini mest framkomnu lásiskipan hugsast kann. Og tá ið tú setir bilin frá tær, lýsir hann tær heim. Vitjið hjá Nissan við Oyggjarvegin ella vitjið heimasíðuna www.nissan.fo



Nissan Micra

P/F **Meinhardt Arge**
við Oyggjarvegin
Tórshavn
tel. 345400 - fax 345401

## Bussar til øll endamál



Serflutningur til rørslutarnaði
Bólkaferðir, bæði innan- og uttanlands
Ítróttarferðir, bæði innan- og uttanlands
Skúlabarnakoyring
Bygdaleiðir
Bussar frá 7 til 56 persónar

Sp/f AP Andreas Poulsen BUSSKOYRING
✆ 22 52 20 - 44 17 20

FO-513 Syðrugøta - e-mail:pouand@post.olivant.fo

## Heimavirkis søla og framsýning

Piddasa handil

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

Gallari Ribarhús

Opið er:
mán.-fr: 15.00-17.30
leyg.: 11.00-13.00

Tel. 444 427

## Úrvalsbilar Spf.



ÚB

- Søla av brúktum innfluttum bilum
- Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

• www.bilar.fo

Bakkavegur • 530 Fuglafjørður • tel. 444 943 • fax 444 638 • Fartel. 281943

GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71




BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður - tel./fax 444 388

HeimaGreiðslan




Tú gert av hvar og nær. Við HeimaGreiðsluni er Sparikassin opin – har og tá tú ynskir tað.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

V A R M A K E L D U S T E V N A N

# VARMAKELDUSTEVNAN HEPNAÐIST VÆL

## Nú hálvan annan mánað eftir at varmakeldustevnan varð hildin, er stevnan ikki endaliga uppgjørd, men latið verður hampuliga væl at fíggjarliga úrslitinum.

Vikuskiftið 4.-6. juli varð varmakeldustevnan hildin í Fuglafirði og vit kunnu verða samd um, at stevnan var ógvuliga fjølbroytt og góð við tiltøkum av alskyns slagi og fyri øll, ung sum gomul. Men veðrið kunnu vit tíverri ikki ráða yvir, og tað hevði verið ynskiligt, tí veðurgudarnir vóru ikki nóg blíðir við okkum. Ikki tí, leygardagin vóru teir við okkum, og í allarfagrasta veðri varð býurin karmur um ein av bestu stevnunum í landinum í ár, samstundis sum tað sjálvdan hava verið so mong vitjandi í býnum ísambandi við nakað tiltak. Alt riggaði væl, sjálvt um fyrireikararnir ikki vóru heilt nøgdir við teirra arbeiði. Serliga var tað tað fyrireikandi arbeiði at fáa til vega fólk, sum ikki var 100%. Men tó so, hetta merktist ikki á tiltøkunum.

Sunnudagurin hinvegin gekk minni væl. Tað oysregnaði mest sum allan dagin, og stóru forvæntningar frá degnum fyri, vórðu til ringt lag og ikki serliga væl vitjað tiltøk - og tað var væl skilligt. Fyrireikararnir høvdu kortini valt at hava øll tiltøk opin, og tey sum vórðu á stevnu fingu so uppliva hoppiborgir og tivoli í oysandi óarføri. Hetta bar eisini til, og fleiri børn hugnaðu sær ófórt í teimum dýggj-vátu hoppiborgunum og tí søkkandi Titanic.

### Hoppiland í høllini

Sum eitt plástur á sárið eftir miseydnaða sunnudagin, valdi nevndin at skipa fyri hoppilandi í ítróttarhøllini á Kambsdali vikuskiftið eftir. Samstundis sum tiltakið skuldi geva felagnum nøkur eyka oyru í kassan eftir soltna úrslitið sunnudagin, bjóðaði felagið piltaliðnum, sum vitjaði í Aalborg í summar, at fáa tey oyruni, sum mangladu í til teirra ferð. Tiltakið eydnaðist stak væl, og mong, bæði ung og eldri hugnaðu sær ófórt millum stóru hoppiborgirnar í høllini á Kambsdali.

### Fíggjarliga úrslitið

Tað er ikki nøkur loyna, at varmakledustevnan er tann størsta einstaka inntøkukeldan hjá felagnum. Í ár spenti felagið bogan høgt, og hevði nógv forkunnug og spennandi tiltøk. Nevnast kunnu mongu hoppiborgirnar, sum vórðu leigaðar úr Danmark og ikki minst tann stóra SMS-kappingin, har høvuðsvinningurin var ein spildurnýggjur Ford Focus 1.6i og ein dreymaferð til Portugal við Maersk-Air. Vinningarnir høvdu eitt samlað virði á kr. 300.000,00. Alt hetta vóru kjansir, sum felagið tók, og sum fleiri óvissur vóru í.

### Uppgerðin ikki liðug

Í dag er mest sum øll tiltøkini gjørd upp, men orsakað av summarfrítíðini er SMS-kappingin ikki endaliga uppgjørd. Úrslitið, sum komið er fram til higartil, er hampuligt, men tað skal ikki vera nøkur loyna, at inntøkan sunnudagin á varmakeldu var lítil og eingin orsakað av vánaliga veðrinum.

Varmakeldustevnan verður endaliga gjørd upp fyrst í september mánaða, og úrslitið fæst at vita á ársaðalfundinum hjá felagnum, sum vanliga verður hildin í februar mánaða.

Nevndin vil hervið nýta høvi at takka øllum teimum mongu sum hjálptu til, at halda eina so stóra og fjølbroytta stevnu. Uttan tykkum, hevði tað ikki borið til, og tey vóna, at bygdafólkið aftur komandi ár fer at vísa sama vælvilja og hjálpsemi.



3. DEILD

# ILT VIÐ AT MANNA LIÐIÐ

Bárður Mortensen, venjari hjá 3. deild, sigur seg hava havt ilt við at manna liðið, og vónar at hetta verður betri, tí annars er vandi fyri vánligum úrslitið í ár.

Í fyrru hálvu vóru ógvuliga nógvar leikarar til venjing, hvørjaferð. Samstundis hevði Sigfríður um 20 mans til venjing á 1. liðnum, so ikki kann sigast annað enn at leikararnir vístu áhuga. Men eftir summarfrítíðina er vent í holuni. Sigfríður hevur allar sínar mans til venjing, men hjá okkum sær einki út. Vit hava verið ímillum 8-10 leikarar til venjing, og tað er altso ov lítið, sigur Bárður Mortensen, sum í ár er venjari hjá næst besta liðnum hjá felagnum. Bárður vísir samstundis á, at hetta er stak óheppið, tí sum er – sjálvt um kappingin er ógvuliga jøvn – er liðið framvegis í niðurflytingarvanda, sjálvt um frástøðan til niðaru liðini er rímuliga stór. Og sum gongdin er hjá besta liðnum, so hava vit eitt 1. deildarlið komandi ár. Og tá ber ikki til at næstbesta liðið leikar í 4. deild, sigur Bárður, sum heitir á allar góðar kreftir um at koma til venjingar og tryggja liðnum góð úrslit komandi dystirnar. Bárður vísir samstundis á, at tað væl ber til at blanda seg í kappingini um heiðursmerkini, sjálvt um tað ikki sær serliga gott út beint nú. -Tað er bert 7 stig upp til nr. 2, sum er EB/Streymur, og tað kunnu vit væl røkka, sigur Bárður at enda. ÍF hevur - áðrenn dystin í morgin ímóti GÍ 14 stig.



*Bárður er venjari hjá 3. deild*

D Y S T U R I N  Í D A G

*(framhald av bls. 3)*

Venjarin hjá 2. deild hjá B36 er bróður tann navnframa og fyrrverandi ÍF venjarin Jógvan Norðbúð. Hann eitur Sjúrður og eftirnavnið er sjálvsagt Norðbúð. Hann hevur fingist við fótbólt í mong ár, og hevur leikt við 1. deild hjá teimum hvít/svørtu í Havn. Seinnu árini er hann best kendur sum dómari, og hevur hann eisini har umboða B36. Og tað er eingin ivi um, at tað er felagið, sum hann veruliga brennur fyri. At hann er venjari hjá 2. deildarliðnum hjá B36, man vera eitt sindur tilvildarligt. - Dia Midjord, sum fram til summarsteðgin var venjari hjá liðnum, kundi av ymsum orsøkum ikki til at halda fram eftir summarsteðgin, og tí gjørdist Sjúrður venjari. Sjúrður hevur allar fyritreytir at vera venjari, tí hann hevur lokið nærum allar venjaraútbúgvingarnar hjá FSF. Kortini hevur hann ikki gjørt nógv við venjaravirki, í øllum førum ikki í eldru deildunum.

### Broytingar á ÍF-liðnum

Til dystin í dag verða helst broytingar á ÍF-liðnum. Miðverjan verður helst tann sama sum fyrstu mongu dystirnar. -Sverri er afturkomin, og verður har saman við Jan, Viggo og Áka. Sostatt verður ikki pláss fyri Árna, sum annars hevur spælt væl. Á miðvøllinum verða størstu broytingarnar. Eyðolvur byrjar nokk í høgra borði og Høgni Z í vinstru, meðan John og Roy vera á sentrala miðvøllinum. Hanus verður álopskendur miðvallari, meðan Høgni verður á toppinum. Hetta er okkara boð upp á liðið í dag. Líkamikið hvørjir ellivu leikarar eru á vøllinum frá byrjan, so ræður um at geva seg 100% allan dystin. Innsatsurin má ikki liggja eftir. Hvussu spælið er, er líkamikið. Tað eru málini, sum telja, og kunnu tryggja okkum stigini. Drivið á dreingir!

AT STYTTA SÆR STUNDIR VIÐ

# TIPS 13



## VEDDA OG VINN VIÐ BIRGARI OG JANUSI

I kappingini "vedda og vinn við Birgari og Janusi" vinnur besti tipparin í einstøku kappingunum ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Umframt vikuvinningin sleppa allir 9 vinnararnir út at bowla saman við 1. liðsleikarunum eftir kappingina. Vinnararnir eru eisini við í lutakastinum um ein APEX-flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

Fyri at luttaka og vinna, skalt tú seta kross í tann rútin (1, X ella 2), ið tú heldur/veitst eru rættir. Skrivað navn, bústað og tlf.nr. og lat hann inn í ovaru hædd í ítróttarhúsinum undir ella beint eftir dystin. Tann ella tey, sum hava svara flest spurningum rætt, eru við í lutakastinum um sodavatns-kassan. Góða eydnu!

*Røttu svarini til spurningarnar hasaferð fært tú at vita í næstu leikskrá. Svarini og vinnarin frá seinast eru á bls. 31.*

Navn:

Bústaður:

Telefon:

*TIPS 13 seðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 min. eftir loknan dyst.*

### ÍF TIPS 13 (set x í rætta rútin)

| 6. UMFAR | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur venjarin hjá KÍ? 1. Kurt Mørkøre X. Jan Joensen 2. Allan Joensen | | | |
| 2. Hvussu eitur nýggi brasilianski liðfelagin hjá Toda Jónsson og FCK? 1. Kleberson X. Messias Perreira 2. Alvaro Santos | | | |
| 3. Nær er NSÍ stovnað? 1. 1952 X. 1957 2. 1962 | | | |
| 4. Hvussu nógvar tatoveringar hevur Trúgvi Nesá? 1. Onga X. Eina 2. Tvær | | | |
| 5. Hvussu eitur heimavøllurin hjá VFB Stuttgart? 1. Olympiastadion X. Gottlieb-Daimler stadion 2. Volkswagenstadion | | | |
| 6. Hvar er Bora Milutinovic venjari? 1. Honduras X. Kina 2. Partizan Beograd | | | |
| 7. Hvørjum felag hevur Bjarne Goldbæk *IKKI* leikt fyri? 1. Hamburger SV X. FC Kaiserslautern 2. Schalke 04 | | | |
| 8. Á hvørjum landsliðið leikar Marek Jankolovski? 1. Kekkia X. USA 2. Polen | | | |
| 9. Úr hvørjum felagi keypti Inter Christian Vieri? 1. Atletico Madrid X. Juventus 2. Lazio | | | |
| 10. Frísparkl! Farligt spæl verður gjørt ímóti Jonn beint uttanfyri brotsteigin hjá B36. Dómarin bríkslar fyri óbeinleiðis **frísparki! Tá Høgni Z.** skal taka frísparkið, gloymir **dómarin at koyra** hondina í loft, fyri at vísa at frísparkið er óbeinleiðis, og Høgni skorar beinleiðis uppá frísparkið... Hvat ger dómarin? 1. Mál X. Málspark 2. Umspark, av tí at dómarin gjørdi ein feil | | | |
| 11. Hvar var HM í 1970? 1. Mexiko X. Chile 2. Argentina | | | |
| 12. Hvør vann Europa-Cup fyri meistarar í 1975/76? 1. Bayern Munchen X. Ajax Amsterdam 2. Liverpool FC | | | |
| 13. Hvussu nógv mál hevur Gabriel Batistuta skotið í sínum 293 dystum fyri italiensk lið? 1. 174 mál X. 178 mál 2. 182 mál | | | |

Føroya Bjór ATLANTIC AIRWAYS



Klipp ella skræð

# HAGTØL & FAKTA

## STØÐAN 2. DEILD MENN - 13. august

| Lið | Dyst | V | J | T | Mál | Stig | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. ÍF | 10 | 7 | 2 | 1 | 19-7 | 23 | 5-0-0 | 2-2-1 |
| 2. Sumba | 10 | 6 | 3 | 1 | 22-5 | 21 | 3-2-0 | 3-1-1 |
| 3. TB | 10 | 6 | 1 | 3 | 25-16 | 19 | 5-0-0 | 1-1-3 |
| 4. VB | 10 | 5 | 1 | 4 | 19-13 | 16 | 3-1-1 | 2-0-3 |
| 5. KÍ | 10 | 5 | 1 | 4 | 21-30 | 16 | 4-0-1 | 1-1-3 |
| 6. AB | 10 | 3 | 4 | 3 | 19-16 | 13 | 3-2-1 | 0-2-2 |
| 7. B36 | 10 | 3 | 3 | 4 | 17-14 | 12 | 2-1-2 | 1-2-2 |
| 8. LÍF | 10 | 3 | 1 | 6 | 14-26 | 10 | 1-1-3 | 2-0-3 |
| 9. B71 | 10 | 2 | 1 | 7 | 14-16 | 7 | 2-1-1 | 0-0-6 |
| 10. B68 | 10 | 1 | 1 | 8 | 5-32 | 4 | 1-1-3 | 0-0-5 |

## LEIKARAHAGTØL 2. DEILD MENN 2003:

| Nr. | Leikari | D | Min | Út | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fróði Poulsen | 6 | 540 | | | | 1 | -6 | 62 |
| 2 | Áki Petersen | 10 | 900 | | | | | 1 | 247 |
| 3 | Jan Skoradal | 10 | 900 | | | 1 | | | 49 |
| 4 | Viggo Johannsen | 10 | 900 | | | | | 1 | 51 |
| 5 | Heini Heinason | 9 | 314 | 2 | 6 | | | 4 | 19 |
| 6 | Fritleif í Lambanum | 7 | 133 | | 7 | 1 | | 1 | 47 |
| 7 | Martin Hansen | 1 | 90 | | | | | | |
| 8 | Sverri Ellingsgaard | 7 | 580 | 3 | | 2 | | | 175 |
| 9 | Rúni Petersen | 3 | 72 | | 3 | | | | 3 |
| 10 | Hanus Eliasen | 10 | 820 | 3 | 1 | | | 4 | 251 |
| 11 | Eyðolvur R.-Petersen | 10 | 849 | 4 | | 1 | | 1 | 133 |
| 12 | Árni Petersen | 2 | 164 | 1 | | | | | |
| 13 | Høgni á Lakjuni | 2 | 31 | | 2 | | | | |
| 14 | Ken Bærentsen | 9 | 646 | 5 | | | | 3 | 142 |
| 15 | Eyðun Ryggshamar | 5 | 81 | | 6 | | | | 11 |
| 16 | Jákup Helgi Egholm | 4 | 360 | | | | | -1 | 4 |
| 17 | Høgni Zachariassen | 9 | 810 | | | 1 | | 2 | 117 |
| 18 | Atli Petersen | 10 | 717 | 9 | | 1 | | 1 | 233 |
| 19 | Roy Róin | 4 | 113 | 1 | 3 | | | 1 | 3 |
| 20 | John S. Thomsen | 9 | 778 | 2 | | 3 | | | 173 |
| 21 | Rógvi Róin | 1 | 83 | | 1 | | | | |

***FRÁGREIÐING:** D: Dystir; Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur; Inn: Dystir innskiftur; G: Gul kort; R: Reyð kort; M: Mál; Stig: í kappingini "ársins ÍF'ari"*

### Vert at vita

Dysturin í dag er fyrsti heimadysturin eftir summarsteðgin. Næsta leygardag spæla vit ímóti B71 á Sandi og síðani VB í Vági. Næsti heimadystur er leygardagin 7. September ímóti KÍ.

3. deild spældi í morgin ímóti GÍ í Gøtu. Næsti heimadystur hjá teimum er sunnudagin 24. August ímóti TB.

Um tú atkvøður í dag um, hvør er dagsins leikari, so ert tú við í lutakastinum um at vinna eitt lambskrov frá Haraldsen. Atkvøðuseðlar eru á síðu 30, ella tú kanst fáa teir í ovaru hæddini ítróttarhúsinum undir og beint eftir dystin.

### Aðrir dystir í dag 2. deild

B71 - AB

VB - B68

KÍ - Sumba

TB – LÍF

### Dystir í 1. deild 24.08 - 13. umfar

B36 - Skála

VB - NSÍ

GÍ - HB

EB/Streymur - FS Vágar

B68 - KÍ

### Dystir í 3. deild 17.08 - 11. umfar

NSÍ - TB

GÍ - ÍF

Skála FS - FS Vágar

Royn - EB/Streymur

HB - B36

### Málskjúttar - 2. deild

| | |
|---|---|
| Eirikur Joensen, Sumba | 7 |
| Áki Mørk, B36 | 6 |
| Kaj Roest, TB | 6 |
| Eyðun Samuelsen, AB | 5 |
| Olgar Danielsen, KÍ | 5 |
| Dan Mortensen, TB | 5 |
| Allan Mikkelsen, TB | 5 |
| Símun Hansen, AB | 4 |
| Hanus Eliasen, ÍF | 4 |
| Heini Heinason, ÍF | 4 |

# ÁRSINS ÍF´ARI 2003

## VETERANURIN KEN VARÐ BESTUR Á VARMAKELDU



Í dystinum ímóti LÍF á varmakeldu kou ikki serliga mangar atkvøður inn. Men tá avtornaði gjørdist veteranurin kenn bestur við 41 atkvøðum í harðari kapping við Sverra og Hanus. Fyri at vera besti leikarin fær Ken ein døgurða-bita fyri tvey frá Pól á Muntra. Vit ynskja honum tillukku!

**Atkvøðutal**

| | ÍF-LÍF | Íalt |
|---|---|---|
| Ken Bærentsen | 41 | 142 |
| Sverri Ellingsgaard | 30 | 172 |
| Hanus Eliasen | 30 | 251 |
| Atli Petesen | 22 | 233 |
| Fritleif í Lambanum | 18 | 47 |
| Fróði Poulsen | 18 | 62 |
| Áki Petersen | 10 | 247 |
| Eyðun Ryggshamar | 9 | 11 |

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikari, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig.

Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

### VINNINGAR

- Ársins ÍF´ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár.

Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen.

HARALDSEN
- titt keyp -

## Atkvøðuseðil

ÍF - B36, 16. august 2003

Dystur: ____________

Nr. 1 (5 stig): ____________ Leikari

Nr. 2 (3 stig): ____________ Leikari

Nr. 3 (2 stig): ____________ Leikari

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari: ____________ Tel.: ____________





# SØLUBÚÐ Í OVARU HÆDDINI Í ÍTRÓTTARHÚSINUM

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum í sambandi við dystir hjá 1. liðnum, eru aftur í ár til dystin fús. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til beint eftir dystin. Tað er eisini í sølubúðini, at tey, sum atkvøða um ársins ÍF´ara og tey sum gita í kappingini ÍF TIPS 13, skulu lata seðlarnar inn.

Sjálvt um hølisviðurskiftini ikki eru av teimum bestu, so er tað eisni í sølubúðini, at prátið um dystin, leikararnar og venjarin fer fram - bæði í hálvleikinum og eftir dystin.



### ÍF TIPS 13 - vinnarin og svarini frá síðstu kappingini

Vinnarin seinastu ferð gjørdist enn einaferð Ólavur Larsen. Hann hevði 11 rætt. Fyri tað fær hann ein sodavatnskassa frá Føroya Bjór. Tillukku við tí. Hann sleppur somuleiðis út at bowla við 1. liðshópinum seinni í heyst, og so er hann eisini við í lutakastinum um Apex-flogferðaseðilin frá Atlantic Airways. Annars halda spælararnir, at hann hevur í so gott samband við rithøvundarnar, so til: veddið og vinnið.....á Ólavi!

Røttu svarini til teir 13 spurningarnar seinast eru:

| ÍF TIPS 13 - Spurningar og svar - 5. Umfar: | Tekn: | Svar: |
|---|---|---|
| 1. Hvar er fyrrverandi ÍF venjarin, Petur Mohr, venjari nú? | X | B68 |
| 2. Hvør gjørdist toppskjútti hjá FCK í farna kappingarárið? | 1 | Todi Jónsson |
| 3. Nær er EB/Streymur stovnað? | 1 | 1993 |
| 4. Hvør hevur heimavøll á Portman Road? | X | Ipswich Town |
| 5. Hvat nr. brúkar Trúgvi Nesá í skóm? | 1 | Nr. 43 |
| 6. Hvør er venjari hjá franska landsliðnum? | 2 | Jacques Santini |
| 7. Hvørjum felag hevur Allan Nielsen IKKI leikt fyri? | 2 | IFK Gøteborg |
| 8. Hvørjum landsliðið leikar Daniel Kenedy á? | 2 | Portugal |
| 9. Úr hvørjum felagi keypti Barcelona Luis Enrique? | 1 | Real Madrid |
| 10. Hvør er einasti leikarin, ið hevur skotið mál í tveimum HM-finalum? | 1 | Paul Breitner |
| 11. SKOTI Fróði hevur tikið beinskinnarin upp í hendurnar og bjargar síðani einum máli við beinskinnarinum... Hvat ger dómarin? | X | Gevur Fróða gult kort og dømur óbeinleiðis fríspark |
| 12. Hvør skoraði sigursmálið í Champions League-finaluni í 1999? | X | Ole-Gunnar Solskjær |
| 13. Hvussu nógv mál hevur Raul skotið fyri Real Madrid? | X | 217 mál |

Ítróttarfelag Fuglafjarðar
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fax 444 636

***Aðalnevndin:***
Formaður
Rúni Petersen, tel. 215887
2. formaður
Høgni á Lakjuni tel. 444418
Peningarøkil:
Linda Joensen, tel. 445132
Skrivari:
Hildigarð Eliasen, tel. 444052/228771

***Fótbóltsdeild:***
Hildigarð Eliasen tel. 444052
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Ólavur Larsen, tel. 224659
Mortan Nónsgjógv
Atli Petersen, 444 018

***Venjarar:***
*2. deild:*
Sigfríður Clementsen, tel. 31 76 59
*3. deild:*
Bárður Mortensen, tel.
*4. deild:*
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
*Old Boys:*
Sonni Jensen, tel. 444 975
*Unglingar:*
Birgar Larsen, tel. 22 10 37
*Dreingir Ø.:*
Janus Petersen, tel. 26 43 99
*Smádreingir Ø.:*
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
*Smádreingir 1/2 vøllur*
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
*Piltar 1/2 v a-b.:*
Hanus Eliasen, tel. 22 17 52
*Smápiltar:*
Atli Petersen, tel. 26 82 95
*Gentur:*
Durita Djurhuus, tel. 44 50 24
*Smágentur:*

*G.10-12 ár:*
Jónfríð Joensen, tel. 254170
*Yngst:*
Hanna Poulsen

# ÍF B36

1. Fróði Poulsen
2. Áki Petersen
3. Jan Skoradal
4. Viggo Johannesen
5. Heini Heinason
6. Fritleif í Lambanum
7. Martin Hansen
8. Sverri Ellingsgaard
9. Rúni Petersen
10. Hanus Eliasen
11. Eyðolvur R. Petersen (liðsk.)
12. Árni Petersen
13. Høgni á Lakjuni
14. Ken Bærentsen
15. Eyðun Ryggshamar
16. Jákup Helgi Egholm
17. Høgni Zachariassen
18. Atli Petersen
19. Roy Róin
20. John S. Thomsen

Venjari: Sigfríður Clementsen
Hj.venjari: Rógvi Roin
Liðleiðarar: Trúgvi Nesá
Tórstein Joensen

Venjari: Sjúrður Norðbúð
Hj.venjari:
Liðleiðari:

## Dómarabólkur:

Dómari: Jóannes Mikkelsen, GÍ
Hjálpardómarar úr GÍ

## Bóltsponsorur: